VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

Nr. 57 • týsdagur • 21. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Føroya Tele skorar kassan



*– Útlitini fyri 2006 eru hampuliga góð, men kappingin á telemarknaðinum í Føroyum er sera hørð. Vit kappast dagliga um kundar og tænastur, og eg rokni við, at tað fer at merkja støðugar príslækkingar frameftir, sigur Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele samtakið*

**Føroya Tele hevði 50 milliónir krónur í avlopi í fjør. GSM-tænasturnar eru týðandi inntøkukelda hjá samtakinum, men skal framgongdin halda fram næstu árini, má Føroya Tele út um landoddarnar við sínum tænastum**

FØROYA TELE
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroya Tele samtakið hevði eitt sera gott ár í fjør. Í gjár var ársroknskapurin lagdur fram alment, og hann vísir eitt avlop á 50,1 milliónir krónur fyri 2005. Hetta er eitt avlop, sum er næstan eina helvt størri enn árið fyri.

– Eg eri sera væl nøgdur við úrslitið. Vit høvdu eitt sindur av niðurgongd í 2003 og 2004, men nú tykist vend verða komin í, sigur Andras Róin, stjóri fyri Føroya Tele samtakið.

Stórur umsetningur er í fastnetinum, men GSM-tænasturnar kasta framvegis nógvar pengar av sær til Føroya Tele. Internetið skapar framhaldandi størri umsetning, men har eru ikki teir somu pengarnir at vinna sum við GSM-tænastunum.

– Vit hava lækkað starvsfólkakostnaðin, samstundis sum vit hava økt virksemið hjá okkum, og tað eri eg væl nøgdur við, sigur Andras Róin.

### Hægri inntøkur

Føroya Tele útskilti á sumri 2005 kervis- og kundatænasturnar í hvørt sítt døttirfelag. Hetta var gjørt fyri at tryggja betri fokusering og betri gjøgnumskygni millum virkisøkini. Føroya Tele samtakið er nú døttirfeløgini P/f Televarpið, P/f FT Net og P/f FT Samskifti.

Samlaðu inntøkurnar hjá samtakinum vóru 307,2 mió. kr. í 2005, sum eru umleið tríggjar milliónir krónur meira enn í 2004. Størsti vøksturin stavar frá internet breiðbandi og Televarpinum. Hóast størsta inntøkukeldan enn sum áður er fastnetið, so hevur ein lækking verið í inntøkunum frá hesum virkisøkinum umframt frá uttanlandssamskifti.

Úrslitið gjørdist 50,1 mió. kr., eftir at 9,6 mió. kr eru settar av til skatt. Tað er 15,6 mió. kr. meira enn í 2004 og svarar til eina framgongd á 45%. Tað góða úrslitið stavar í høvuðsheitum frá lægri avskrivingum og lægri lønarkostnaðum, samstundis sum ein lítil vøkstur var í samlaðu søluni.

Í 2005 vórðu íløgur gjørdar fyri 45,8 mió. kr. netto, og tað er munandi minni enn tey seinastu árini. Væntandi fara íløgurnar at vaksa í 2006 og komandi árini. Orsøkirnar til hetta eru millum annað breiðbands- og fipurútbyggingar, og at ein nýggjur uttanlandskaðal møguliga verður lagdur.

### Meira í útlandinum

Nú tá ið Føroya Tele hevur so stórt avlop, kunnu vit so vænta príslækkingar?

– Útlitini fyri 2006 eru hampuliga góð, men kappingin á telemarknaðinum í Føroyum er sera hørð. Vit kappast dagliga um kundar og tænastur, og eg rokni við, at tað fer at merkja støðugar príslækkingar frameftir, sigur Andras Róin.

Hann heldur eisini, at skal framgongdin hjá Føroya Tele haldast næstu árini, so má felagið út um landoddarnar – tey kunnu ikki bara líta á føroyska marknaðin.

– Tað er avgerandi fyri okkum, at vit økja okkara umsetning í útlandinum. Tað er neyðugt, um Føroya Tele skal vaksa um sítt virksemi, sigur hann.

– Vit arbeiða miðvíst fram ímóti, at vit kunnu fáa størri virksemið uttanfyri Føroyar, og her kemur vónandi ymiskt at henda næstu árini.

## Meiri samstarv við íslendingar

**– Tað er bæði sunt og gott fyri okkum at kunna samstarva meira við íslendingar um orkuspurningar sum heild heldur stjórin í Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu**

ÍSLENDINGAR OG VIT
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Herfyri varð skipað fyri heldur óvanligum skeiðvirksemi í Jarðfeingi í Hoyvík. Umboð fyri íslendska orkumálaráðið vitjaðu og kunnaðu um íslendsku orkulóggávuna og orkuvirksemi sum heild, um somu tíð sum umboð fyri føroyskar oljumyndugleikar kunnaðu um oljutilgongdina í Føroyum. Stjórin á Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu heldur fyri, at hetta var eitt sera gott tiltak. – Tað varð sera væleydnað. Tað er sera gott og sunt fyri okkum at kunna kjakast við onnur, sum arbeiða við somu spurningum sum vit. At venda spurningum við onnur. Tey læra nakað men vit læra so sanniliga eisini nakað við teimum samrøðum vit hava við tey. Sigurð í Jákupsstovu sigur, at tey fingu nógv áhugavert at vita um íslendsku elveitingina, eitt øki, sum íslendingar hava drúgvar royndir við og sum vit nú eru farin at fáa okkum meiri vitan um.

– Eg haldi vit kunnu gott útbyggja okkara samstarv við íslendingar nógv meira enn vit hava gjørt. Tess meira vit kunnu samskifta um hesi økini tess meira kunnu vit læra av hvørjum øðrum. Her er so talan um orkupolitikk sum heild, sum fevnir bæði um elveiting, oljuleiting o.a. Ísland er eitt væl størri land enn vit, og teir eru tí eisini komnir longur enn vit á fleiri økjum. Teir hava eisini reint fakliga eitt sera sterkt umhvørvi, sum vit kunnu fáa ágóðan av. Vit tosa eisini nærum sama mál og sambandið millum Ísland og Føroyar eru eisini vorðið sera gott.



*Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi er fegin um samstarv við íslendingar á orkuøkinum*